## Matiné í Havnar Kirkju

Leygardagin klokkan 11.30 er matiné í Havnar Kirkju við vokalkvartettini Kata, sum er navnið á bólkinum, har fýra føroyskar kvinnur syngja bulgarskar sangir. Bulgarskur fólkatónleikur er heimskendur fyri sítt serliga ljóð. Sangarinnurnar eru Katrina Petersen, Unn Paturson, Eyð Berghamar Jacobsen og Anna Maria Olsen. Allar eru tær virknar sum solistar í ymiskum høpum, og hava nógvar royndir innan kórverdina. Tað, sum ger, at tær hava valt at syngja bulgarskar sangir er tað, at harmoniirnir, klangurin, rytmurnar og søgurnar skapa eitt heilt serligt og spennandi ljóðunivers. Hetta er klárt ein onnur uppliving enn tann vanliga føroyska kórkonsertin, ikki tí, einki ringt um tað yvirhøvur, tvørturímóti, men tað verður bara ein bulgarsk konsert, siga tær og heilsa øllum vælkomnum.



## ST-sáttmálin um rættindi teirra brekaðu umsettur til føroyskt

Seinasta freist at lata viðmerkingar til føroysku umsetingina av ST-sáttmálanum um rættindi teirra brekaðu er mánadagin 20. oktober. Uttanríkisráðið sigur, at viðmerkingar kunnu sendast til mfa@mfa.fo. - Tað hevur stóran týdning, at sáttmálin eisini er umsettur til okkara mál. Á henda hátt kunnu vit beinanvegin varpa ljós á ásetingarnar í sáttmálanum og byrja at tillaga okkum til tær. Tí umframt at broyta lóggávu, snýr sáttmálin seg eisini í ein stóran mun um at broyta hugburð, sigur Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri.

# Fongur fyri føroyskar lista-brúkarar

**Livandi blandið av fakligum innliti og spontanum eldhuga ger nýggju listabókina hjá Inger Smærup Sørensen til ein sannan fong hjá øllum við áhuga fyri føroyskari nútíðarlist**

UMMÆLI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fríggjadagin komin nýggja listabókin *Livandi list* eftir Inger Smærup Sørensen, listfrøðing, í bókabúðirnar. Bókin er í nógvar mátar ein fongur fyri listaáhugaðar føroyingar og onnur, ið hava saknað eitt yvirlit yvir og innleiðslu í føroyska nútíðarlist. Júst nútíðar lista-heimurin kann nevniliga tykjast rættiliga flóktur at fáa greiðu á, tí har hendir allatíðina okkurt nýtt og tí tey mongu listafólkini leita í so nógvar ymsar ættir.

Hesin ymiskleikin er eisini útgangsstøðið hjá Inger S. Sørensen, og verður bókin tí í sær sjálvum ein afturvísing av vanliga páhaldinum um, at føroysk list er einsháttað og síðbundin. Í staðin borðreiðir listfrøðingurin við einum fyllishorni, sum stendur til at bresta av listarligum lívi og litum, sum folda seg út beint fyri nøsini á okkum - um vit tíma at hyggja.

### Listin kjakast

Innihaldsliga er bókin skipað soleiðis, at hvørt av teimum 49 listafólkunum hevur fingið eina síðu við teksti og tríggjar við myndum av verkum. Hóast bókin í so máta ikki tykist gera mun á fólki, merkir tað ikki, at Inger Smærup Sørensen meinar, at list er demokratiskt. Tvørturímóti aftrar hon seg tíbetur ikki við at vísa á, at tað eru úrmælingar, sum skapa listina,

Tá tað er sagt, sparir listfrøðingurin lesararn fyri skrásikrar dómar, ið lítið annað lata eftir seg enn eitt afturlatið listaverk. Heldur letur hon verkini kjakast við viðkomandi listarlig rák og ástøði á ein hátt, sum letur verkini upp í tráð við egnar treytir, sum ger teg klókari uttan mun til, um tær dámir verkið ella ikki. Við tætta samspælinum millum verk og ástøði, verður verkið samstundis ein nýggjur lykil til ástøðina. Ella við øðrum orðum: í hondunum á Inger Smærup Sørensen verður sjálvt ofta turra og troytta ástøðin líka sprelllivandi, sum livandi listin beint her og nú. Við nærverandi sitatum og tilsipingum verða listarlig kjak og ástøði flættað inn í tekstin, so tú áðrenn tú veit av kennir teg sum heima millum orð sum 'fini' og 'sample' og onnur gátuført heiti, sum knappliga gera tað munin lættari at seta orð á verk eftir til dømis Amariel Norðoy ella Hanna Bjartalíð.

Eitt bragd má tað eisini sigast at vera, at alt hetta hendir í einum frásøgustíli, sum næstan er gyklandi lættur uttan at fakligheitin nakrantíð verður við sviðið soð. Til tey, ið hava hug at dvølja eitt sindur meir við fakligu heitini, er ein orðalisti aftast í bókini, sum ongantíð dettur í felluna, har lesarin druknar í frøðiheitum.

### Eldhugaður serfrøðingur

Hóast bókin ongan iva letur vera um, at Inger Smærup Sørensen er serfrøðingur á sínum øki, er tað týðiligt, at hon ikki hevur gloymt at undrast yvir, stuttleika sær við og bara njóta listina. Hon aftrar seg ikki við at lata tað skína ígjøgnum, at onkuntíð er verkið líka við at gleppa henni av hondum í royndini at lýsa tað - nakað, sum eftir mínum tykki oftast bara ger lýsingina enn sterkari og listina enn meir livandi. Sum til dømis í lýsingini av Hanna Bjartalíð, har Inger S. Sørensen setur orð á, hvussu listamaðurin setur tað barnsliga, tað spontana og tað vaksna saman í sínum myndum

» ... tað ótrúliga er, at tað verður hvørki annað ella hitt, tað verður ikki spontant, vaksið ella barnsligt. Tað verður til nakað heilt serstakt. Og Hanni Bjartalíð fær alt at tykjast so argandi lætt, men tað er øsandi torført, tí tað er ein heilt nýggjur máti at líta at heiminum ...«

Í slíkum løtum er tað ringt ikki at lata seg ávirkað av eldhuganum hjá høvundanum. Og hví ikki bara lata seg draga við?

Hevur tú bara eitt sindur av listarligum forvitni við tær, letur bókin *Livandi List* dyrnar upp til eitt sjálvtøkuborð, har tú kanst velja at eta teg proppmetta ella njóta leksiligu bitarnar í smáum og goyma nakrar til seinni. Bókini er nevniliga skipað soleiðis, at hon lætt kann brúkast sum uppslagsbók, har nøvnini á listafólkunum standa í bókstavarøð, og ongin tekstur er longri, enn at tú altíð hevur stundir at lesa hann.



*Tað er torført ikki at lata seg ávirka av serliga blandinum av spontanari listarligari gleði og dyggum fakligum innliti í bókini »Livandi list« eftir Inger Smærup Sørensen, listfrøðing*

*Mynd: Jens K. Vang*